Tórbjørn Jacobsen, havnarmeistari og loðsur her saman við skiparanum Jan Oscar Wiklund á brúnni á West Hercules

Vit gjørdu tað: Fyri og eftir West Hercules

Deil:

Jan Müller

22.10.2014 - 14:56

Oljan.fo

"Tað eru hendingar á leiðini, sum fylla meiri í huganum, og sum hava størri týdning enn aðrar. At ein av heimsins størstu oljuriggum í summar vann sær veg inn á Skálafjørðin í umvælingarørindum er ein av hesum serligu staksøgunum, sum ítøkiliga flytir okkum eitt skarvslop hin rætta vegin á ymsum mótum", sigur havnarmeistarin við Runavíkar havn, Tórbjørn Jacobsen í samrøðu við Oljuportalin. Tórbjørn man vera eitt av teimum fólkunum, sum hevur staðið hesi verkætlan næst, og tí hevur oljan.fo biðið hann greiða frá hesum lítla og sjáldsama oljuævintýrinum á Skálafjørðium.

Ein serlig hending í føroyskum vinnulívi

-Hvat hugsaði tù, tá hesin oljurisin kom inn á Skálafjørðin?

“Tá hevði eg sum loðsur longu verið umborð á honum í 27 tímar, tí var eg helst meiri akklimatiseraður í vitjanina enn øll tey mongu, sum fylgdu honum, tá hann nærkaðist landi og smeyg sær spakuliga inn um fjarðagáttina, og legði seg út fyri Runavíkar havn, har hann lá í seks vikur, fyrst hildin á knattstøðuni av øðrum skipum, meðan skrúvurnar vórðu skiftar, og seinri við egnari megi. Tað er nú uppgávan hjá einum havnarmeistara, í góðari samvinnu við privatu kundarnar, at fjølga sum mest um virksemi á fjørðinum, við bryggjurnar og við havnaløgini. Tí eigur ongin møguleiki at vera ein ov stórur biti, heldur skal alt, sum flytir seg á maritima økinum vera ein sjálvsøgd avbjóðing.

Síðani eg var óviti havi eg so av og á havt mína gongd á Tórshavnar Skipasmiðju. Ein av lærlingunum í maskinsmíði, sum man legði merki til, var ein blaðungur Mouritz Mohr. Knáur til arbeiðis og vit hava kenst soleiðis, at vit hava skift orð, tá vit hittust síðani tá. Síðani hann gjørdist stjóri hjá Mest, og eg sjálvur gjørdist havnarmeistari við Runavíkar havn, hava vit av góðum grundum samskift dúgliga. Mest eigur skipasmiðjuna á Skála og eina størri deild/smiðju í Runavík. Vit hava onkuntíð tosað um hendan møguleikan, og tað sum mest hevði líkst fyrigyklingum gjørdist brádliga veruleiki í vár, tá dóttirfelagið hjá Mest, Pam Offshore, meiri ella minni hevði syft West Hercules inn um stokkin og inn á Skálafjørðin. Tá eg fekk tann fyrsta teldupostin frá Sea-Drill manninum Einari Vindenes, flaggdagin í ár, tástaðni trúði eg veruliga, at Mouritz hevði gjørt sítt heimaarbeiði ríkiliga gott. Prosessin haðani kendist á mangan hátt sum at renna marathon, krøvini kendust tíðum órímilig, ov ástøðilig fyri ein gamlan skipara, men vit høvdu neyðugu kondi´ina til tess at fylgja eigarunum, og serliga tí var tað ein góð kensla at snúgva sær inn um Saltnes, áðrenn skýmingina hetta minniliga kvøldið hin 19. august 2014, tá fyrsti oljuriggurin nakrantíð kom inn á ein føroyskan fjørð fyri at vera umvældur í góðan mánað. Áhugin kring landið er helst besta dømi um, at hetta var ein serlig hending í føroyskum vinnulívi.”

Eitt skarvslop

-Hvønn týdning hevur hann so havt fyri Skálafjørðin og tykkum, sum har búleikast og annars fyri føroyska vinnu og føroyska samfelagið?

“Hóast tær fyrstu 9 royndarboringarnar undir Føroyum ikki hava verið atvoldin til nakra framleiðslu, so hevur hendan tíðin á mangan hátt lyft samfelagið, og hartil hevur fíggjarliga íkastið heldur ikki verið at forsmáa. At føroyskar fyritøkur so eisini hava valt leiklutin at vera við í hesi vinnu á altjóða støði er helst orsøkin til, at tað nú bar til at venda myndini. At ein fyritøka í Føroyum bjóðaði arbeiðsmegi fram til tess at gera umvælingina í egnum landi heldur enn at senda arbeiðsmegina av landinum, sum vanligt hevur verið. Vit mega minnast til, at fyritøkur í hesum klassanum, bæði eigarar og leigarar, seta krøv, sum bara tey best kvalifiseraðu megna at ganga á møti. Eg havi ikki hoyrt annað frá nøkrum enn tað, at alt gekk uppá stás, og at tíðarmørkini hildu, ein faktorur sum eftir øllum at døma er týdningarmeiri enn peningur í hesum gesjeftinum.

Tíðin, meðan West Hercules lá á fjørðinum, var heilt serlig. Tað kendist sum fór lokalsamfelagið úr øðrum upp í fimta gear. Fjørðurin, bryggjur og stræti ýddu í lívi

sólaringin á tamb í hálvanannan mánaða. Riggurin lá sum eitt eldhav á fjørðinum og boðaði frá lívi, onkursvegna bleiv hann fokusið hjá øllum, sum sóu hann, ongin slapp undan at síggja hann, og skip og bátar sigldu aftur og fram, hýruvagnar hurraðu í døgndrift, kvikir matgerðandi lógvar løgdu lunnarnar undir næstu vaktina hjá teimum mongu, sum arbeiddu umborð, og krambúðir, matstovur og gistingarhús høvdu úr at gera. Lutfalsliga var tað jú ein stór rúgva av fólki, sum kom inn í eitt lutfalsliga lítið øki. Og tað merkist. Sum havnarmeistari havi eg ikki hoyrt frá nøkrum, sum var misnøgdur við átakið, tvørturímóti hevur hetta pulserandi lívið havt positivt árin á samfelagið og fólkið, sum her býr. Tey flestu spyrja nú, nær vit skulu vænta hin næsta riggin inni á Skálafjørðinum.

Fyri føroyska vinnu og harvið samfelagið gjørdist hendan royndin eitt skarvslop, eitt paradigmuskifti. Tað kann kennast nakað hazarderað at fara undir eina roynd sum hesa, tí miseydnast hon, so er læst og fyribundið, álitið er fokið. Hinvegin, eydnast royndin, so hevur tú vinnuliga, handverkliga og harvið sum samfelag flutt teg rættiliga langt fram á leið, tá hevur tú prógvað, at tú ert javnførur við kappingarneytarnar. Tað økir eisini um sjálvvitskuna, til tess at herja á í aðrari syftu, líkamikið hvussu stór avbjóðingin annars fer at vera. Teir hjá Mest og Pam Offshore megnaðu tað, sum fyri bara einum hálvum ári síðani líktist einum vinnuligum lognbrái. Vit gjørdu tað, sum vit megnaðu. Løgdu fjørð, bryggjur, manpower og havnaløg til, og góða samskiftið vit høvdu við allar aktørar, á øllum rókum, frá niðast til ovast, tóktist at gagna átakinum."

Tað gekk sum smurt

-Hvussu kendi tú tað at standa aftur á brúnni og loðsa hann aftur til havs?

"Vit brúktu nógva orku fyri at fáa teir avvarðandi at kíka tí, at tað ongin trupulleiki var at koma inn á Skálafjørðin við einum risa sum hesum. Ein oljuriggur, sum siglur, er í grundini eitt skip, og skal ikki fatast sum annað, men sjálvandi, hann er einar 10 ferðir breiðari enn skipini, sum vanliga koma inn á fjørðin, og tí skal ansast væl eftir, og fyrireikingarnar skulu vera í topp. Sjefurin kom við tyrlu inn nakrar dagar fyri komu, og vit sótu leingi á Havnarskrivstovuni og tosaðu um viðurskiftini. Hann fekk øll tey data, sum vit høvdu, og saman gjørdu vit eina skrá fyri, hvussu hetta skuldi avgreiðast sum best. Hann ynskti at fáa loðs í góðari tíð, tí flutti ein tyrla loðsin út nakað væl fyri komuna. Hann stakk slakar 16 metrar. Tað skal nú sigast, at tá vit passeraðu gamla prestagarðin á Nesi og nærkaðust vitanum á Garðsenda, tá kendist traktin ímillum Strendur og Saltnes visuelt í trengra lagi, men vit høvdu dokumentatiónina tøka, sum gjørdi greitt, at hetta fór at ganga. Og tað gekk sum smurt. Vit løgdu fráferðina soleiðis til rættis, at hann fór norður um Føroyar eystanfyri. Tyrlan kom eftir mær, tá vit nærkaðust Svínoynni. Hann hevði viðrák heilt vestur á Mýling, og nú er hann komin vestur til Nýfunnaland, har hann fer í vinnu hjá Statoil."

-Hvussu kann henda fyrsta royndin at umvæla ein pall á Skálafjørðinum brúkast víðari?

"Tað verður lættari at marknaðarføra fjørðin og føroyska handverkaravinnu eftir hesa royndina. Ongin ivi um tað. Hendan royndin er longu altjóða kend í oljuvinnuni, nógv er skrivað um hana, ikki minst Jan Mülleri fyri at takka. Munurin ímillum at eiga hesa

dokumentatiónina, um at tað bar til, ja, heilt væl til, í mun til at standa sum á bera jólum, tómum lógvum og við biðjandi eygum á altjóða marknaðinum er ein himmalvíður munur. Allir impliseraðir partar mega nú brúka knúgvar og høvd til tess at draga aðrar oljuriggir til landið, soleiðis at hetta kann gerast ein gevandi vinna afturat teimum, sum frammanundan eru í landinum. Tað verður í hvussu er lættari at fremja eina meiri ítøkiliggjørda marknaðarføring, og tey persónligu sambondini, sum skapt eru hesa tíðina, eru heldur ikki at forsmáa. Tað skal eisini sigast, at teir, sum stóðu á odda hinumegin borðið, vóru óvanliga góðir at samstarva við, heilt í serflokki."

Ein viðvarðandi vinna á Skálafjørðinum

-Hvat eiga vit at gera fyri at marknaðarføra okkum?

"Eg havi spurt norðmenninar, sum stóðu á odda fyri hesum øllum, eftir einari eftirmeting, evaluering, mest fyri at finna útav, hvat vit evt. kunnu gera betri í eini aðrari syftu. Hon er ikki komin enn, men vit eiga eisini at gera okkara egnu eftirmeting, hóast grundarlagið ikki er so rúgvismikið eftir eina og fyrstu royndina. Skuldi hetta blivið ein viðvarðandi vinna á Skálafjørðinum, so kundi ein loysn verið, at ein bryggja varð gjørd júst til hetta endamálið, har dýpið var einar 22-25 metrar, soleiðis, at riggurin kundi ligið við bryggju. Tað hevði gjørt operatiónina munandi rationellari, eisini fíggjarliga fyri eigaran. Ivist ikki í, at bæði Runavíkar havn og Mest og Pam Offshore fara at brúka West Hercules vitjanina ítøkiliga í marknaðarføringini frameftir, so væl sum hon nú einaferð eydnaðist, ein góð søga kann altíð brúkast sum hespa í royndini at fjølga um virksemi, og tað er tað, sum alt snýr seg um. Eg havi sitið á Havnarskrivstovuni, tá alt rapaði kring um okkum, flakavirkið stongdi, trolararnir vórðu lagdir, og Landingarmiðstøðin læt aftur. Ta syndarligu støðu ynski eg, tíansheldur fólkið, sum her býr, fyri alt í verðini ikki at uppliva aftur. Tað var sum at vera til eina drúgva jarðarferð hagartil glið kom aftur á transportbondini, kvikar kvinnuhendur og trolararnir loystu frá bryggju aftur."

-Og hvønn týdning hevur tað, at vit eru umboðað á oljumessum o.l. í hesum sama høpi?

"Týdningarmesta samskifti við kundar er dagliga at samskifta telefoniskt, í skrift ella persónliga. Hesar messurnar eru kanska eitt sindur yvirtulkaðar, men kortini fungera tær sum eitt vagl, har allir aktørarnir savnast yvir eitt stutt tíðarmál, konsentrerað, og til ber at hitta tey, sum tú hevur tørv á at hitta ella at samskifta við. Runavíkar havn hevur verið oljuveitingarhavn allar tær 9 ferðirnar, sum tað higartil er borað undir Føroyum, tí hevði tað verið beinleiðis tápuligt, um vit ikki møttu upp til eina stevnu sum hesa í Stavanger og í Aberdeen annað hvørt ár. Tað er eisini rætt av føroyingum at hava sín egna bás, soleingi vit eru eitt potentielt mál hjá oljufeløgum í leitingarhøpi, og harafturat haldi eg eisini, at tað er eitt sera gott átak, at Runavíkar havn og Tórshavnar havn samvirka um hesa móttøkuna umborð á sluppini í Stavanger. Hetta eru teir báðir býirnir í landinum, sum onkursvegna eru vertir hjá oljufeløgunum, tá tey virka í Føroyum, og har ber til at koma í prát við fólk, sum tú ikki hittir aðrar staðir. Kapasitetar, sum á hvør sínum øki innan hesa vinnu vita somikið, at tú fært eina skilagóða heildarmynd av tí, sum fer fram á hesum økinum."

Oljan ella steinøldin

-Og til stóra spurningin: hvat væntar og vónar tú fer at henda í sambandi við oljuleitingina?

“Fyri hvønn dag, sum gongur, gerst oljan ein alt størri trotvøra, hetta er ein samlað og endalig goymsla, sum tikið verður burtur av dag frá degi, tí fara oljufeløgini framhaldandi at royndarbora har, sum bara ein evarska lítil møguleiki er fyri at finna olju ella gass. Ongin ivi um tað. Alternativar orkukeldur, vindur, vatn og sjóvarfall vinna tíbetur fram fyri hvønn dag, sum gongur, men heimurin er enn ikki búgvin til at vera oljuna fyriuttan. Skrúvaðu vit fyri tí kelduni í dag, so var alternativið steinøldin. Tí beri eg ongan ótta fyri, at áhugin fyri føroyska økinum fer at minka. Kanska ein lítil stígur kom í av seinastu boringini, væntaninar vóru so stórar, men tá tær frustratiónirnar eru lagdar aftur um bak, verður lagt til brots aftur, og lítið er at ivast í, at vit einaferð fara at bera við olju í rakstarverdugum nøgdum, og ímeðan ber til at menna okkum uppaftur meira í virkseminum, sum spurningarnir hjá tær snúðu seg um, at umvæla útgerðina, sum brúkt verður til tess at finna oljuna á heimshøvunum.”